# ES-politikkurin hjá ABC er ótíðarhóskandi og má broytast

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður

**Føroyar mugu sum skjótast í samráðingar við ES-nevndina at vita, hvørjar treytir eru fyri at gerast partur av Europasamveldinum. Hetta er átrokandi neyðugt, nú Ísland hevur søkt um ES-limaskap, og Noreg er farið at hugsað um sama mál**

Tey flestu síggja nú skriftina á vegginum: Føroyar mugu sum skjótast í samráðingar við ES-nevndina at fáa greiði á, um og hvussu Føroyar kunnu gerast partur av Europasamveldinum.

Hetta er átroðkandi neyðugt, nú grannar okkara og sterkastu kappingarneytarnir á fiskivinnuøkinum nærkast ES við risastórum fetum. Ísland hevur søkt um ES-limaskap, og í Noreg eru fólk farin at umhugsa somu leið sum íslendingar.

Avgerðin hjá íslendska Altinginum um at søkja Íslandi limaskap í ES fær stóra ávirkan á vinnuliga kappingarføri Føroya. Í stuttum, er sannlíkt, at føroyska fiskivinnan frameftir ikki verður kappingarfør mótvegis íslendsku fiskivinnuni, ið fær fyrimunir innan ES.

Við mistum kappingarføri fer landið at bløða fíggjarliga. Inntøkurnar fara at svíkja, og tað fær avleiðingar fyri vælferðina og alt annað, sum skal fíggjast í Føroyum.

EFTA-felagsskapurin viknar í stórum. Einasti “vinurin” hjá Føroyum í EFTA er á veg úr felagsskapinum, og sannlíkt er, at grundarlagið undir EBS-skipanini er farið at ridlað. Eisini av hesi orsøk eigur føroyskur Europapolitikkur at rætta kós.

Løgmaður eigur sum skjótast at taka stig til, at Europapolitikkurin hjá ABC-samgonguni verður dagførdur sambært tí veruleika, vit í dag eru í.

Heimurin er nógv broyttur seinasta árið.. Ein heimsfevnandi kreppa er komin, og hon ber í sær, at heimsins samfeløg ganga saman og samstarva meira enn nakrantíð, t.d. í ES.

## Náðar leiðara

*Tá ið Adolf Hitler*
*legði seg í song,*
*tók hann sína Bíbliu*
*og blaðaði upp at lesa*
*um bróður sín í andanum*
*Dávid Kong*

*Teir sita nú í Himli*
*teir báðir*
*Adolf Hitler og Dávid kong,*
*og kjakast um 266B*
*vørr á foldum*
*pr politiska brong.*

*Kári Post og Karsten*
*og Bill og Jenis,*
*ja, teir enda vist allir*
*í Himli*
*bara teir hava 266B*
*krosskastaðan penis.*

*Idi Amin og Pól Pott,*
*og hinir einglarnir*
*í Himli*
*spæla uppá harpu*
*diskuterað politikk*
*og hava tað gott.*

*So, hví skuldi Jóannes*
*Ejdesgaard ikki eisini*
*sloppið til Himmals*
*við sínari fíggjarlóg?*
*Fyri tey útvaldu*
*er hon jú sera góð!*

*Fyri øll glataðu*
*er fíggjarlógin ein*
*niðurskurður uppá sítt pláss*
*meðan løgtingsins*
*egna eftirløn og løn*
*ordiliga vísur noss.*

**Hallur Andreasen**

## Sangarakut

*Stóra vatnoysarí hjá Una Arge*
*ger meg í ringum lag, eg kann ei torga;*
*Tey løg ið psyku geva ein malør;*
*Nei gev mær heldur Símun Konoy*
*so blívi eg í betri humør.*

*Jens Eli Ellefsen við síni rødd tí gomlu*
*riggar til róðrarbátaáralag úr homlu;*
*Og syngur Anfinn at havnamenn*
*enn rógva út við bandi;*
*Er ikki væl dámt í landkrabbanna landi.*

*Hvar bleiv Tónlist av í øllum varpi?*
*Eru longu gloymdir, teir frægu tónagarpar;*
*Ella er tað bara eg, ið eri vorðin gamal?*
*So dámi Vestmenn, Annika Hoydal og*
*systkinabarnið Sámal.*

*Lív Næs er ein sangfuglurin nýggji*
*ið fær mítt gamladreingja hjarta at skríggja;*
*Tað var nú, man skuldi verið ungur*
*nú Guðrun Sólja og Eivør og Linda*
*tóna upp úr lungum.*

*Frøkun Lisberg má eg ikki gloyma;*
*Tann sjarmu røddin fær sangir at sveima;*
*Ja sungna mál á døprum døgum vinnur;*
*Støðan er 1-0 móti monnum*
*til Føroya kvinnum.*

**Hallur Andreasen**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

†

**Ellen Cemina Poulsen**
vanliga nevnd Mina,
ættað úr Sumba,
búsitandi í Havn,

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum, 15. juli, 66 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum,
mánadagin tann 20. juli kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum
týsdagin tann 21. juli kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Henry, Naina, Áshild og Jens Rúni**

†

Sagt verður frá, at kæri svágur, pápabeiggi og mammubeiggi okkara

**Danjal Jacob Mortensen**
Øravík

andaðist á Suðuroyar Ellis- og røktarheimi
sunnudagin 19. juli, 87 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi
týsdagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Bønhúsinum í Øravík
ónsdagin kl. 13.
Sungið verður úr Sálmabókini.

*Vegna tey avvarðandi*
**Marlena**

Tey, ið vilja minnast Danjal Jacob, kunnu lata Bønhúsinum eina gávu.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin